


*Frásagnirnar hjá Daniel eru úr enska blaðnum Echoes of Service, sum er komið út síðan 1872. Tað ber til at kunna seg meira um hetta blað á heimasíðuni: www.echoes.org.uk*



*Tað vóru eisini myndir við í greinunum hjá D. J. Danielsen. Hendan myndin vísir Linu og Daniel á ferð. Sanniliga er nógv broytt*

kann við anda sínum opna hjartað á prestinum.

At koma frá ein oyggj til aðra hava vit brúk fyri einum báti, sum ikki hevði verið so dýrur at keypt og røkt. Tørvurin er stórur og tíðin stutt. Eg havi selt nógvar bíbliur og nýggja testamenti (hetta var gjøgnum bretska bíbliufelagið). Tey eru so bílig, at sjálvt tey fátækastu kunnu keypa. Biðið eftir, at skriftirnar skulu vera til mikla signing. Brøðurnir í Havn eru í ferð við at byggja ein nýggjan sal (gamli Ebenezer), sum skjótt verður til reiðar at taka í nýtslu.

*D. J. Danielson*
*Fyrrverandi meistari á Congo dampskipi.*

## Hevur eisini verið í Suðurafrika

*Í mai 1905 heldur Echoes of Service tað vera uppá sítt pláss at geva eina nærri frágreiðing um Dollan, har tað verður sagt:*

Í sínum seinasta brævi her í blaðnum undirskrivaði Danielson seg sum maskinmeistara á einum Congo dampskipi. Hann skrivar, at hann var ikki við nøkrum teimum 50 farmaskipunum á Congoánni, men at hann eina tíð var við einum av trimum dampskipum, sum sigla við friði. (Hetta talið sigur nakað um tann stóra trafikkin, sum hevur verið á Congoánni. Tað var eisini ein hópur av øðrum missiónsskipum).

Danielsen er føroyingur, men eftir at hava lært til maskinmeistara fór hann til sjós og sigldi í nógvum pørtum av heiminum. Í Glasgow var hann í 1897 umvendur til Gud og hevði eina stóra trongd at kunna seg um Hansara orð og at læra Hansara vilja. Hann ynskti inniliga at fara til heidningarnar at fortelja teimum um Jesus, og eftir at hava verið í Suðurafrika eina tíð, svaraði hann eini lýsing eftir einum kristnum maskinmeistara til Congo. Hann fór tískil í 1901 sum meistari við einum missiónsbáti, og so skjótt hann hevði lært seg málið hjá teimum innføddu, fór hann at prædika evangeliið. Seinast í 1903 mátti hann fara heim aftur, tí veðurlagið hevði skatt hansara heilsu, og hann varð leiddur til at geva seg sjálvan til evangeliskt arbeiði í sínum heimlandi.

*Tað nýggja í hesi frásøgn er, at Daniel hevur verið í nógvum londum og harímillum eisini í Suðurafrika. Hetta hevur ikki verið frammi í nøkrum tilfari annars. Tað kundi verið áhugavert at vita, hvat ið hann gjørdi í Suðurafrika, men hetta fáa vit nokk ikki at vita! Men tað var um hesa tíðina boarakríggið var.*

**Síðan greiðir Daniel soleiðis frá í sama blað:**

## Tørvur og arbeiði í Føroyum

Eg tosi føroyskt, og tað dámar fólkinum best, hóast skriftirnar eru skrivaðar á donskum. Føroyskt verður tosað í øllum heimum og í skúlunun, men øll mugu læra eitt sindur av donskum í skúlanum, og næstan allar skúlabøkur eru á donskum.

Seremoniir eiga ein stóran part av trúarlívinum her, sum verður mett at vera í samsvar við Martin Luther. Men nógv sóknast eftir Gudi, og í fleiri bygdum hava vit eina dýrabara tíð. Á Viðareiði eru nógv sum sóknast, og nøkur fá játta Kristus sum teirra frelsara, men vit hava einki samkomustað. Roykstovur í bóndahúsum eru ov smáar, men eini samkomuhús vildu økt nógv um virkismøguleikarnar. Tað eru framvegis nógvar oyggjar, sum ikki hava hoyrt evangeliið á hin gamla einfalda hátt, men nakað av tí sái, sum bróðir Sloan hevur sáað so trúfastur í so mong ár, er byrjað at næla.

Vit hava alla orsøk til at takka okkara himmalska Faðiri fyri, at hann sendi bróður Sloan til hesar oyggjar. Hann er farin at eldast og er ikki førur fyri at fara um landið sum fyrr. Men nú eru komnir nakrir maskinbátar, og vit hava frætt, at tað fara at koma størri dampbátar (rutubátar), so vit vóna, at tað verður ikki so trupult framyvir.

Missiónsvirkið á hesum oyggjum er fyri ein stóran part at fara hús úr húsi, og tá eg sjálvur eri innføddur, liggur betri fyri hjá mær at koma í samband við fólk.

Í summar hava vit havt útimøtir. Fólk á bygd hava ikki eins og í Havn nakað marglæti at hava til. Alt er meira einfalt á bygd.

Tey, sum eru trúføst, halda fast við, at tað dýrabara orð Guds er omanfyri alt. Gud hjálpi okkum at gera tað sama.

## Grundarlagið verður lagt í barndóminum

*Tann 22. august 1906 skrivar D. J. Danielsen:*

Eg havi vitjað nakrar av oyggjunum í summar, hevði góð møtir og seldi fitt av skriftunum. Hevði fólkið bert trú, at Bíblian veruliga er Guds orð til teirra. Mong lesa ongantíð í Bíbliuni, meðan onnur hugsa, at tey kunnu vinna tokka hjá Gudi við at lesa hana. Biðið eftir, at Harrin skal signa vitnisburð okkara og gera okkum førar fyri at náa mong á teimum fjarskotnu oyggjunum.

Frá barni av verður fólkið lært, at tey verða Guds børn í barnadópinum. Eg minnist, tá eg var ein lítil drongur, at mamma spurdi meg nakrar spurningar, hvørja ferð eg var koyrdur í song, sum eg skuldi svara soleiðis: "Hvør hevur skapað teg?" "Gud Faðir!" "Hvør hevur leyskeypt teg" "Gud Sonur!" "Hvør hevur heilaggjørt teg?" "Gud Heilagi andi!" "Nær gjørdist tú Guds barn?" "Í dópinum!". Næstan allar mammur fylgja hesum, og tað sama verður lært í skúlum og kirkjum. Prísaður veri Gud kortini, tí har sum ljósið skínur, má myrkrið dvína. Nógvir av hesum gomlu vanunum eru nú við at doyggja út.

Í eini bygd í Suðuroy, Porkeri, koma nú 12 fólk saman at bróta breyðið í heiminum hjá einum av teimum trúgvandi og gleðast í nýfunna frelsara og vini sínum. Eisini á Viðareiði eru nøkur fá, sum tilbiðja Gud í anda og sannleika, eins og á øðrum av oyggjunum. Hesi mugu verða ofta vitjað, tí tey hava nógv at berjast ímóti. Biðið Guds fólk gera so væl at biðja fyri verkinum í hesum parti av víngarði Harrans.

*Tað áhugaverda her er, at Daniel sigur, at tað var mamman, sum lærdi hann sín barnalærdóm. Annars hevur verið skrivað, at hann vaks upp hjá mammubeiggjanum, postmeistaranum C.C. Danielsen. Sum áður greitt frá giftist mamman, Sigga, við Jákup á Kamarinum. Tí kann tað hugsast, at Daniel er fluttur til mammu sína, tá ið hon giftist. Tað skal eisini sigast, at tey sum kenna seg sum nærmastu skyldfólk hjá Dollanum eru tey á Kamarinum.*

*Porkeri er onnur bygdin, sum Daniel nevnir við navni at hava vitjað. Her vitjaði gamli Sloan fyrstu umleið 1878/1879. Ein lítil samkoma, Bethania, byrjar í 1906. Tá er tað, at Daniel virkar saman við Arthur Brend, sum var ein samverkamaður.*



*Ólavur á Váli hevur teknað tekningar. Tað vóru eingir salir at hava møtir í. Men bóndahúsini høvdu stóra roykstovu, har møtini mangan vóru hildin*



*Roykstova*